## YouTube á 11 málum

Alnet filmsíðan YouTube verður nú givin út í níggju ymiskum nationalum útgávum og fleiri eru í væntu. Frammanundan er upprunaliga amerikanska útgávan, umframt ein kinesisk. Men nú verður YouTube eisini at finna í eini enskari, franskari, írskari, hollendskari, spanskari, italskari, polskari, japanskari og brasilianskari útgávu. Síðurnar vera landsins máli, og national leitiskipan verður. Í longdini er eisini ætlan at hava serligar hittlistar til ymisku londini.



## Kvinnur eru meira erkvisnar

Ein kanning við Aalborg Universitet vísir, at kvinnur eru meira erkvisnar enn menn. Tær siga fyrr AV! enn menn, bæði tá talan er um trýst á vøddar og um kulda, skrivar avisen. dk. Eisini vísir kanningin, at kvinnur oftari hava migrenu enn menn, og at summar pínutablettir ikki rigga eins væl hjá kvinnum, sum hjá monnum.



hevur misskilt hesa mentan, tí endurtøkan goymir í sær eitt hav av variasjónum og nýuppliving, av alsamt skiftandi sosialum samspæli, sum er sum eitt fullført mótspæl til tíðarinnar radikalu narsississmu.

Føroyskur dansur sampakkar sostatt á næstan fullkomnan hátt við ta nýggju hugmynd, sum heilsufrøðingar í dag føra fram, har rørsla og gleði eru ein hjartatáttur. Dansur er sálarligur lekidómur.

Ein útgáva sum henda er ætlað føringum sum útlendingum, dansifólki sum øðrum áhugaðum. Vert er í hesum sambandi at hava í huga, at tilfar sum hetta kann hava týdning sum normskapandi vøra. Eingin kennir framtíðina, men tað er ikki óhugsandi, at ein so sprækin mentan sum henda kann koma at vera fyri endurburði, eisini uttan fyri okkara land, í tíðum, tá ið menniskjan møðist av síni egnu tøkni ella av at geispa munnin úr lið framman fyri sjónvarpsskíggjans armóð.

## Tamarhald og frælsi

Tað er tá ikki líka mikið, hvussu ein slíkur arvur verður umsitin, víðariborin ella endurkveiktur. Ein útgáva sum henda sigur okkum, at samstundis sum henda mentan hevur pláss fyri gleði og kæti og, viðhvørt, eisini fyri meira enn einum farra av sjónleiki, so er hon eisini stýrd og strong, borin




av hevd og reglum, sum gleða og aga, av eini fruktagóðari togan millum kæti og gravitas. Verður hesin spenningurin millum frælsi og tamarhald, formsins aga og kætisins sprækni ikki virdur og dyrkaður, er henda mentan, soleiðis sum vit kenna hana, ikki til meira.

Ein kann ikki annað enn fegnast um, at henda útgáva er komin. Nú spónurin er settur í greytin, fara ivaleyst aðrar at koma. Tær fara at vera øðrvísi, tí dansurin er ymiskur, frá bygd til bygd, frá felag til felag. Soleiðis eigur tað at vera. Og kanska fara vit í framtíðini at síggja útgávur, har eisini long kvæðir kunnu hoyrast og síggjast borin fram í fullari longd.

## *Føroyskur dansur*

***Brot úr 17 kvæðum, vísum og tættum. Dansifelagið í Havn. Upptøkur: Sjónvarp Føroya. Útgevari: TUTL, Reynagøta 12, FO 100 Tórshavn, Faroe Islands. www.tutl.com. 189 kr.***

Sosialurin